LM-068/2022

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

við Áir 10. sept 2021

Til Umhvørvis- og vinnumálaráðið
uvmr@uvmr.fo

Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd

Fiskaaling hevur fingið uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd til hoyringar.

Fiskaaling hevur lisið lógaruppskotið og vit taka undir við lógaruppskotinum. Tað hevur týdning at náttúruverndin verður skipað eins og tað er neyðugt at fylgja við støðuni í náttúruni.

Fiskaaling metir eisini, at tað hevur týdning at skipa eina nationala eftiransing, ið er tillaga til okkara viðurskifti og sum fevnir um eina skipaða innsavning av sýnum, kanningarætlanir og viðgerð av úrslitum. Ein skipað eftiransing vil tryggja at neyðugar kanningar verða gjørdar eins og ein skipað innsavning av data tryggjar tíðarseriur, ið hava týdning, tá metingar skulu gerast til tess at meta um broytingar kunnu síggjast í náttúruni á sjógvi og landi.

Somuleiðis er neyðugt at data verða goymd og skipað soleiðis at tað er møguligt at gagnnýta data í ymiskum samanhangum og á tann hátt áhaldandi fáa vitan, sum kann verða grundarlag undir gagnnýtsluni av okkara náttúru.

Tá endamálið við lógini verður lýst í serligu viðmerkingunum, eigur lýsingin av náttúruni og teimum prosessum, ið eru grundarlag undir dynamikkinum, at fevna breitt. Hetta merkir, at náttúran í breiðum høpi er sett saman av m.a. djórum, plantum, soppum og mikrobiellum processum. Alt hetta hevur týdning fyri vistfrøðiligu tilgongdirnar og framleidni í náttúruni, og er avgerandi fyri dynamikkin í náttúruni.

Blíðar heilsur

Jóhanna Lava Køtlum
stjóri